## Undirvísingar- og Mentamálastýrið

# United World College

The Red Cross Nordic United World College Foundation bjóðar einum føroyskum skúlanæmingi, ið er liðugur í 1. studentaskúlaflokki á sumri 2000, at taka IB (International Baccalaureate, ið merkir altjóða studentsprógv), eftir 2 árum í einum altjóða studentaskúla í Dale í Noregi. Dale liggur umleið 100 km norðan fyri Bergen.

Endamálið hjá skúlanum er at fremja altjóða sátt og semju í verki, og verður hetta m.a. gjørt við, at næmingar úr 60-70 ymiskum londum búgva og lesa saman á skúlanum.

Undirvísingar- og Mentamálastýrið rindar skúlagjaldið, og næmingurin, ið fer á United World College, fær stuðul frá Stuðulsstovninum eftir somu treytum, sum studentaskúlanæmingar í Føroyum.

Nærri upplýsingar um skúlan fáast við at venda sær til Undirvísingar- og Mentamálastýrið, Falkavegi 6, 100 Tórshavn, tlf. 355050.

Umsókn um upptøku á The Red Cross Nordic United World College, ljóstak av støðumetan, og stutt frágreiðing um teg sjálva/n skulu vera Undirvísingar- og Mentamálastýrinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 10. mars 2000. Gjørt verður vart við, at einki umsóknarblað finst.

19. februar 2000

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**

# Ársaðalfundur

Ársaðalfundurin hjá Felagnum Tórshavn verður

**sunnudagin 5. mars kl. 15.00**
**á Hotel Hafnia**

Uppskot til mál ið ynskjast viðgjørd á aðalfundinum skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi hósdagin 2. mars.

Dagsskrá fyri ársaðalfundin verður send limum felagsins í brævi sambært viðtøkum felagsins.

**Nevndin**

# Aðalfundur

Aðalfundur felagsins verður í MBF húsinum 4. mars 2000 kl. 15.00.

Skrá samb. lógum felagsins.

Mál til aðalfundin mugu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 25. feb. 2000. Eftir aðalfundin sigur Elin Mørkøre frá um nýggja kálkskannaran.

**Nevndin**


# Betri svøvn

## BIOflex magnetviðgerð tí:

- BIOflex magnetviðgerðin eravgjørt tann besta magnetviðgerðin í verðini!
- BIOflex hevur prógvað ávirkanina við dupultari blindtest!
- BIOflex hevur 100 ferðir størri ávirkan enn líknandi vørur!
- BIOflex er góðkent sum heilsuútgerð!
- BIOflex hevur víst, at yvir 92 % verða pínufrí og øll sova betri!

Vøran er testað á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn.

Sosialurin - 311820

Ring 21 79 16 og tosa við okkara vegleiðara.

Magnetviðgerð er tað nýggjasta innan pínuviðgerð - og júst BIO flex undirdýnan, sum er vard við einkarrætti í allari verðini, hevur víst, at 92 % verða pínufrí. Vello Føroyar veitir tær aftursendingarrætt í 5 vikur, tá dýnan hevur verið brúkt í minst 3 vikur.



**Viðgerð, ið virkar ímóti:**

- Øllum slagi av pínu • Vøddastívleika
- Trupulleikum við svøvni • Órógv í blóðrenslinum
- Einastandandi fyri ryggjatrupulleikar

BIOflex® MAGNETTERAPI

Vello Skandinavia Sp/f hevur síðani 1989 selt fleiri enn 25.000 BIOflex viðgerðir í Danmark og virkið hevur framhaldandi framgongd við viðgerðini. BIOflex er best á marknaðinum innan magnetiska viðgerð.

Nærri upplýsingar ella faldari fæst hjá: **Vello Føroyar**
Boks 354 - FO-700 Klaksvík • Tlf: 217916 - Fax: 457916







# Vit gera alt URTAGARÐSARBEIÐI

- Grasvøllir • Planting • Viðlíkahald
- Seta gravsteinar upp v.m.
- Gera tún við flisum ella oljugrúsi
- Grevstur í sambandi við olljutangaskifti o.a.

Spyr - tað kostar einki!

Við 25 ára royndum hava vit roynt tað mesta

**Fa. SÍMUN DALSGAARD**
Boðanesgøta • FO-188 Hoyvík
Tel. 31 54 78 • Fartel. 21 28 00 • Fax 32 04 78


# Reingerð

Hervið skal verða sagt frá, at arbeiði at vaska skúlan í Hovi er lýst leyst at søkja.

Arbeiðið er ásett til at verða 2 tímar dagliga.

Møguligar umsóknir skulu latast til Hildur Gunnarsdóttir, kommunuskrivara, í seinasta lagi 26. feb. 2000.

Skrivarin kann greiða frá setunartreytum og hvat lønin er. Bygdaráðið tilskilar sær rætt at velja millum umsóknirnar.

**Hovs bygdaráð**

# NÓSA KAPPING 2000

Sosialurin - 311820

## B36 INNANDURAKAPPING Í FÓTBÓLTI

**B36 bjóðar gentum og dreingjum at gera lið til kapping í fótbólt í Ítróttarhøllini á Hálsi 25. og 26. feb.**

**Aldursbólkar:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Pinkur | | (f. 1990 ella seinni) |
| 2. | Gentur | 10-12 ár | (f. 1988-1989) |
| 3. | Smágentur | | (f. 1986-1987) |
| 4. | Gentur | 14-17 ár | (f. 1983-1984-1985) |
| 5. | Pinkulingar | | (f. 1992 ella seinni) |
| 6. | Smápiltar | | (f. 1990-1991) |
| 7. | Piltar | | (f. 1988-1989) |
| 8. | Smádreingir | | (f. 1986-1987) |
| 9. | Dreingir | | (f. 1984-1985) |
| 10. | Unglingar | | (f. 1981-1982-1983) |

**Í øllum deildum eru 5 leikarar, og leikt verður við málmanni. Tó eru bara fýra leikarar hjá dreingjum og unglingum -her er eingin málmaður. Loyvt er at hava skiftisleikara. Liðini skulu hava navn eftir fótbóltsfelag (t.d. Rosenborg, Leeds, HB). Luttøkugjaldið, sum er 200 kr. fyri hvørt liðið, verður goldið, tá ið kappingin byrjar. Avmarkað luttøka.**

**Tilmelding kann fara fram hjá undirritaðu:**
Kommunuskúlin: Jakob Thomsen, tel. 31 62 29
Venjingarskúlin: Poul Rói Mohr (8.b) tel. 31 68 95
Eysturskúlin: Jógvan Martin Mørk, tel. 31 61 25
Argja skúli: Fróði Hansen, tel. 31 61 65

Ella hjá onkrum av venjarunum hjá B36 í Ítróttarhøllini. Eisini ber til at ringja.

**Seinasta freist at boða frá luttøku er týsdagin 22. feb.**

merki til trý tey fremstu liðini í hvørjum bólki.



FØROYA BANKI

# Til sølu

**Sethús í Leirvík:**

| | |
|---|---|
| Grundøki: | 604 m² |
| Stovuhædd: | 105,72 m². Stova, køkur, 4 kømur, baðirúm, gongd. |
| Kjallarahædd: | 138,01 m². Høvuðsinngongd við trappu upp á stovuhædd, vaskirúm og kjallarárum. Eitt kamar við wc og egnari inngongd. |

Áhugaði kunnu venda sær til

**Húsalánsgrunnin, tlf. 314583**

# Almennur politiskur fundur

Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag skipar fyri almennum politiskum fundi mánakvøldið 21. februar kl. 19.00 á Landsbókasavninum.

Evni: Politiska støðan nú og í framtíðini.

Við á fundinum verða Helena Dam á Neystabø, Sámal Petur í Grund og Jákup Sverri Kass.

**Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag**



# Forritari

**Til kt-deildina hjá Tórshavnar kommunu verður søkt eftir forritara.**

**Høvuðsuppgávur**

Nakrar av høvuðsuppgávunum hjá forritaranum verða at:

- menna skipanir í Delphi við MS-SQL sum databasu.
- gera brúkaravegleiðingar.
- gera smærri skipanir í Access
- umsita Internetið og nærnetið
- hava innlit í øðrum skipanum, sum umsitingin brúkar.
- veita hjálp í MS-produktum á superbrúkarastøði.

**Aðrar uppgávur**

Saman við hinum á deildini taka eina hond í, tá á stendur. Avloysa hini á deildini.

**Førleikakrøv**

Neyðugt er at umsøkjarin er útbúgvin forritari ella hevur hollar royndir innan økið. Kunnleiki og royndir við Delphi, MS-SQL og onnur Microsoft forrit er ein fyrimunur. Umsøkjarin má vera røkin og duga at arbeiða sjálvstøðugt

**Kommunan bjóðar**

Eitt áhugavert starv við stórum og fjølbroyttum avbjóðingum. Kommunan bjóðar neyðug skeið.

**Setunarviðurskifti**

Starvið verður lønt eftir sáttmálanum millum TKST og Tórshavnar kommunu. Fyrivarni verður tikið fyri góðkenning frá landsstýri og TKST. Starvið verður at seta skjótast møguligt.

**Meira fæst at vita**

um starvið við at venda sær til Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, ella Inga Ellingsgaard, kt-leiðara, tlf. 315160.

**Umsókn**

saman við viðmælum og upplýsingum um royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórhavn, í hendi í seinasta lagi 6. mars 2000.

---

Kt-deildin umsitur alla edv-útgerð hjá Tórshavnar kommunu. Deildin er í støguðari menning við fjølbroyttum uppgávum og avbjóðingum. Í løtuni starvast 3 fólk á deildini.

Tórshavnar kommuna



# Hvalvíkar kommuna

Kommunuskrivstovan er flutt í hølini hjá fyrrverandi Føroya Banka. Skrivstovan er opin hóskvøld frá kl. 19.00-21.00.

**Hvalvíkar kommuna**
Tlf. 422350 • Fax 422010
E-mail: hvalkom@post.olivant.fo


# DATASPOR

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 319192**


# Grundskeið í boring

**Tð arskeið: 6. mars – 17. mai 2000**

Grundskeið í boring er eitt ástøðiligt (teoretiskt) skeið innan boritøkni. Skeiðið gevur ikki ein endaligan førleika at arbeiða innan borivirksemi, men gevur eina ástøðiliga upplæring, ið saman við verkligari upplæring í teimum einstøku fyritøkunum gevur førleika til ymisk arbeiði sum t.d.

- tornarbeiði
- boridekksarbeiði

Skeiðið er ein fyrsta innføring í ymiskt boritekniskt arbeiði, og tað er sostatt eitt fyrsta stig á vegnum hjá teimum, sum ynskja at sleppa at arbeiða á hesum øki.

Skeiðið verður hildið í samstarvi við Stavanger maritime videregående skole, ið eisini stílar fyri skrivligu próvtøkuni. Skeiðið verður sostatt eisini góðtikið sum førleikagevandi av OLF (Olieindustriens Landsforening i Norge).

Skeiðsgjaldið er 10.000 kr, og fevnir tað um undirvísing, undirvísingartilfar, eina viku námsferð til Stavanger, har vitjað verður hjá ymiskum fyritøkum v.m. og eitt 5 daga trygdarskeið. Lokið trygdarskeið er ein fyritreyt fyri at arbeiða í frálandavinnuni.

Ein fyritreyt fyri at innskriva seg til skeiðið er, at tú í minsta lagi hevur lokið SIT-útbúgving ella hevur samsvarandi kunnleikastøði. Viðkomandi verkligar royndir kunnu síðustillast við SIT-útbúgving.

Skeiðið verður hildið á Tekniska Skúlanum í Tórshavn.

Seinasta freist at innskriva seg til skeiðið er 24. feburar, og faldari um »Grundskeið í boring« og innskrivingarblað fáast við at venda sær til ein av stovnunum, sum eru limir í Oljuútbúgvingarsamtakinum.

Meiri um skeiðið fæst at vita við at vitja heimasíðuna hjá Maskinmeistaraskúlanum (www.mec.fo) ella hjá einum av hinum skúlunum, ella við at venda sær til Undirvísingar- og Mentamálastýrið, Falkavegur 6, Tórshavn, tlf. 355050.

Tórshavn 28. januar 2000

**Oljuútbúgvingarsamtakið**

---

Oljuútbúgvingarsamtakið, ið er eitt samtak millum Tekniska Skúlan í Tórshavn, Tekniska Skúlan í Klaksvík, Maskinmeistaraskúlan, Føroya Sjómansskúla og Undirvísingar- og Mentamálastýrið, skipar fyri einum 7 vikur grundskeiði í boring í døgunum 6. mars – 17. mai 2000. Skeiðið endar við próvtøku.


# Sandoyingar, hyggið her!

# AKUPUNKTUR!

Um undirtøka verður fyri tí, verið eg at hitta á Sandi frá ***21. til 25. februar***.
Viðtalutíð fæst við at ringja á telefon **37 28 88** ella **21 28 88**.

**AKUPUNKTIÐ**
v/ Marjun Olsen
Tvøroyri


# Granskingarráð Føroya

**Stuðul frá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum til granskingarverkætlanir.**

Á fíggjarløgtingslógini fyri 2000 eru 3,6 mió kr. settar av til granskingarverkætlanir. Ráttanin fer til at stuðla føroyskari gransking í Føroyum ella í millumtjóða samstarvi. Ein lítil partur av hesi upphædd er tøkur nú og verður hervið lýstur leysur at søkja.

Stuðul verður latin granskingarverkætlanum framdar á føroyskum granskingarstovni ella í tøttum samstarvi við føroyskan granskingarstovn. Fyrimunur er, um umsøkjari kann vísa á stuðul frá øðrum stovni ella grunni eisini.

Umsóknir skula skrivast á serligt oyðublað, ið fæst við at venda sær til skrivstovuna hjá Granskingarráði Føroya, ella á internetadressu: www.sleipnir.fo/gransking/

Umsóknarfreistin er ***13. mars 2000***.

Nærri fæst at vita við at venda sær til skrivstovuna.

**Granskingarráð Føroya**
Handan Á 5 • 100 Tórshavn
tlf. 31 53 02, faks 31 89 29,
e-postur: annikajo@fsf.fo.

# Kunngerð

Tað verður við hesum gjørt kunnugt, at býráðið á fundi 16. desember 1999 samtykti,

*at* útstykkingin yviri við Strond fær navnið:

***Breiðablik***

*at* útstykkingin við Marknagilsveg 98-100 fær navnið:

***Fjalstún***

*at* ***Norðari Ringvegur***

skal ganga frá rundkoyringini við R. C. Effersøesgøtu og enda við Dalavegin.

*at* ***Marknagilsvegurin***

byrjar við Dalavegin og endar við Velbastaðvegin á horninum við kirkjugarðin

*Tórshavnar kommuna*




# Muskelterapeut

**VØDDAVIÐGERÐ**

Hevur tú:

• høvuðpínu • læsta øksl
• músa-arm • knýttar vøddar o.a.
• **ella ynskir tú viðgerð fyri vælveru**

**Hervør Jacobsen**
LÆKNAEXAM.
MUSKELTERAPEUT

**Tlf. 21 30 34**
(eftir kl. 16.00 vanl. gerandisdagar, tó ikki hósdag)